# Hans Pauli hartar Rósu

**Rása Samuelsen, landsstýriskvinna skal ikki vænta sær stuðul frá Hans Paula Strøm, eftir at hon hevur givið boð um sparingar á ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri**

Randi Jacobsen

Tá ið fyrstu boðini komu frá Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu um sparingar á eldraøkinum við at niðurleggja røktarheimspláss, regnaðu mótmælini frá samgongulimum niður yvir hana.

Úrslitið var, at Rósa Samuelsen tók uppskotið aftur 5. august.

Nú er aftur galið.

- Vit samgongulimir í trivnaðarnevndini og Rósa Samuelsen høvdu eina púra greiða avtalu um, at sparingar skuldu ikki gerast millum annað á sambýlinum og Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi á Tvøroyri. Vit vóru samd um at arbeiða víðari við øðrum uppskotum, sigur Hans Pauli Strøm.

Tí gjørdist hann ikki sørt skakkur, tá ið hann í hesi vikuni sá eitt bræv frá Rósu Samuelsen til stjóran á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi um sparingar á tí heiminum.

- Rósa Samuelsen veit væl, at hon hevur ikki undirtøku fyri hesum. Hon beinleiðis mótarbeiðir samgonguni, sigur Hans Pauli Strøm.

## Eitt krav

Hann krevur, at Rósa Samuelsen tekur skrivið til røktarheimið aftur, og ger hon ikki tað, skal hon ikki vænta sær stuðul til nakað annað frá samgonguni. Hans Pauli Strøm veit væl, at Rósa Samuelsen hevur heimild til at fremja sparingar, men stendur hon við hesa spariætlanina, skal hon ikki vænta sær stuáðul frá Hans Paula Strøm til nakað annað tiltak..

Boðini frá landsstýriskvinnuni eru, at tað ikki longur skal búgva meira enn eitt fólk á hvørjum kamari. Tað er bara ein fjald sparing, heldur Hans Pauli Strøm.



*Hans Pauli Strøm lovar ilt*

Hann hevur annars tað hugskot, at skal tann broytingin gerast, kundi landið keypt eldrasambýlið frá Vágs kommunu og skipað tað sum deild undir ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri. Har er rúm fyri átta fólkum.

Hetta hevði havt við sær eina millumrokningar við Vágs kommunu, sum hevur sett seg í stóra skuld til nýggja røktarheimið.

- Men eg krevji, at Rósa Samuelsen tekur hasi boðini aftur, sigur Hans Pauli Strøm.

## Eingin viðmerking

Rósa Samuelsen sigur, at hon tímir ikki at gera nakrar viðmerkingar til eina slíka hóttan frá Hans Paula Strøm.

Annars arbeiða hon og Nærverkið saman um ymisk onnur uppskot, sum skulu leggjast fyri trivnaðarnevndina.

# Gera kunningarferð til Kanada

**Mentanarnevnd løgtingsins fer í aðru viku til Danmarkar og til Kanada at kunna seg um skúlaviðurskifti**

Randi Jacobsen

Mentanarnevndin í løgtinginum hevur sett sær fyri at kanna, hvussu skúlaskipanin í Føroyum kann mennast, og tí fer nevndin á kunningarferð til Danmarkar og til Kanada. Ferðin verður frá 29. august til 6. september.

Viðurskiftini, sm nevndin ætlar at seta seg inn í eru fleiri.

Tey fara at vitja miðnámsskúladeplar, sum eru stórir integreraðir sovnar, eins og skúladepilin í Marknagili er ætlaður. Ætlanin er annars eisini at umskipa miðnámsútbúgvingarnar í Føroyum.

Í Føroyum verður eisini tosað um at umskipa tíggjundu flokkarnar og seta á stovn eftirskúla.

Í huganum hava limirnir í mentanarnevndini eisini, at ætlanin er at menna og styrkja Fróðskaparsetrið.

## Vitja samstarvsfelaga

Tað er ikki av tilvild, at mentanarnevndin hevur valt at fara til Kanada.

Har er málið at vitja University of Princ Edward Island, ið hevur eina deild, sum í fleiri ár hevur granskað smá oyggjsamfeløg.

Um hetta skrivar Magni Laksáfoss, formaður í mentanarnevndini í grundgevingini fyri at vitja henda stovnin:

- Føroyar hava fleiri ferðir vrið partur av granskingini, onkuntíð sum granskingarevni og aðrar tíðir eisini sum granskingarpartnari, har føroyskir granskarar hava verið partur av granskingartoyminum. Endamálið er at vita, um møguleiki er fyri tættari samstarvi, og/ella um Fróðskaparsetrið kundi havt fyrimun av at havt líknandi deild.

Tað finst í heiminum bara ein onnur líknandi universitetsdeild, sum granskar í smáum oyggjasamfeløgum. Tað universitetið er í Tasmania, hinu megin jørðina.

- Tað hevði sjálvandi verið nógv dýrari at farið so langt, sigur Magni Laksáfoss.

## Øðrvísi skúlar

Í Danmark verður farið at vitja Ørestadsgymnasiet, sum er ein nýggjur og øðrvísi útbúgvingarstovnur.

Ætlanin er at vitja ein fusioneraðan miðnámsskúla, sum bæði hevur gymnasium, tekniskt gymnasium og handilsskúla, sum eisini er ætlanin at hava í Marknagili.

Mentanarnevndin fer harnæst at vitja eftirskúlar í Danmark fyri at fáa at vita, um hugskotið við eftirskúla kann brúkast í Føroyum.

Í Kanada ætlar mentanarnevndin eisini at kunna seg við teirra skúlaskipan.

Ætlanin var, at øll mentanarnevndin við skrivara skuldi fara av landinum saman, men tveir limir hava givið avboð, og varalimir teirra fara heldur ikki við.

Sostatt verða seks fólk við í ferðini. Ferðin er mett at kosta góðar 90.000 krónur. Íroknað eru bæði flogferðir, innivist og dagpengar.

# Dýrari at tryggja fjallfólk

**Fólk, sum fáa skaða á fjalli, fáa nú størri endurgjald enn áður, men afturfyri er tryggingargjaldið hækkað nógv**

Randi Jacobsen

Fram til 1. januar í ár rindaðu hagastýrini í ognarhagunum 450 krónur um árið í trygging fyri fjallfólkið.

Men so lætt sleppa tey ikki longur.

Á nýggjárinum kom nýggj lóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða. Henda lóg hevði við sær, at tey, sum fáa skaða á fjalli, fáa væl størri endurgjald.

Samstundis er inngjaldið fyri tryggingina farið upp.

Nú rinda hagarnir við hagastýrum 450 krónur fyri mørkina, og minsta gjaldið er 750 krónur.

Er talan um bónda, sum tryggjar sítt virksemið, rindar hesin fyri egnan persón og tey fólk, sum hann setir í starv. Gjaldið er 2650 krónur fyri fulltíðarstarv, svarandi til 1800 tímar um árið. Hann ger upp eina ferð um árið, hvussu nógvar tímar, hann hevur havt í tænastu í sínum virksemi.

Petur Andreasen, sum er formaður í hagastýrinum fyri Stranda haga á Borðoynni, er ørkymlaður av hækkaðu tryggingini.

Í fyrsta umfari sýtti hann fyri at gjalda so nógv. Hann vildi tó ikki lata standa til og hevu gjørt avtalu við Tryggingarfelagið, og sambært hesum krevur tryggingin peningin frá hagastýrinum, um skaði hendir. Stranda hagi er sjey merkur, og tað merkir, at gjaldið er farið úr 450 krónum upp í 3150 krónur.

- Hatta fer als ikki at bera til hjá nógvum hagum í Føroyum. Hagarnir, sum ikki selja haruhaga, hava onga inntøku, men inntøkurnar eru høgar til stik, pelar og heilivág, sigur Petur Andreasen.

# Golfo Azurro er her framvegis

Seinastu dagarnar hevur skipið Golfo Azurro hjá Sea Shephard siglt millum oyggjarnar. Skipið er tollað, og manningin hevur tí loyvi at fara í land.

Tvær ferðir er fólk farið í gummibáti inn í eina gjógv við Skæling at kava.

Í gjárkvøldið og seinastu nátt lá skipið í Nólsoyarfirði.